Álit

í

løgtingsmáli nr. 8/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (Yvirtøka av málsøkjunum Landslæknaembæti, eftirlit við heilsustarvsfólkum og stovnum á heilsuøkinum, sjúkufyribyrging, sinnissjúkraviðurskifti, líkskoðan, vevnaðarflutningi, euforiserandi evni, sjúklingarættindi og eftirgjørdan gitnað)

Høgni Hoydal, Sirið Stenberg, Bjørt Samuelsen, Kristina Háfoss, Beinta Løwe Jacobsen og Hervør Pálsdóttir, hava vegna Tjóðveldi lagt málið fram 3. august 2020, og eftir 1. viðgerð 3. september 2020 er tað beint Uttanlandsnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 10. og 17. september, 29. oktober, 4. og 12. november og 9. desember 2020.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Landslæknaembætið í Føroyum og í Grønlandi. Landsstýrismaðurin í heilsumálum, Kaj Leo Holm Johannesen, hevur verið á fundi saman við Michael Boolsen, fúta og formanni í farsóttarnevndini, Shahin Gaini, smittuserfrøðingi og Bjarna á Steig, yvirlækna, Tórmóði Stórá, leiðandi yvirlækna á psykiatriska deplinum, Landsapotekaranum, umboð fyri Deildina fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, Fólkaheilsuráðnum og Heilsutrygd.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Bill Justinussen, Brandur Sandoy, Frimodt Rasmussen, Jaspur Langgaard, Beinir Johannesen og Heðin Mortensen) tekur ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Meirilutin hevur ymiskar viðmerkingar:

<u>Bill Justinussen, Brandur Sandoy, Frimodt Rasmussen, Jaspur Langgaard og Beinir Johannesen hava hesar viðmerkingar:</u>
Tíðin hevur víst, at tað er neyðugt at umhugsa møguliga yvirtøku av epidemilóggávuni. Landsstýrismaðurin hevur fyri nevndini upplýst, at undir koronusóttini hevur eitt bráðfeingis toymi av serfrøðingum tikið á seg uppgávur, sum vanliga liggja hjá einum lógarskipaðum heilsustýri. Havandi í huga framúr góðu handfaringina higartil av farsóttarátøkunum, er væl hugsandi, at yvirtøka av epidemilógini ikki hevur aðrar stórvegis avbjóðingar við sær. Undirritaðu halda, at landsstýrismaðurin eigur at kanna fyrimunir og vansar við eini møguligari yvirtøku fyri at lýsa málið til fulnar.

<u>Heðin Mortensen hevur hesar viðmerkingar:</u>
Undirritaði vísir á, at nakrir fyrimunir kunnu verða við sjálvari yvirtøkuni: Embætið kann verða meira sjónligt í Føroyum, enn tað er í løtuni. Tó er tað helst ein fyrimunur, at eftirlitið við heilsustarvsfólkum og kærumøguleikin um sjúklingarættindi verða varðveitt í danska Heilsustýrinum. Men helst kann ein yvirtøka av landslæknaembætinum føra við sær, at lógarverkið verður betur tillagað føroyskum viðurskiftum.

Tað kunnu tó eisini verða nakrir vansar: Um ov lítið av serkunnleika og ov lítið av peningi verður sett av til nýggja "heilsumyndugleikan", kann hetta fáa álvarsligar fylgjur fyri heilsuverkið. Og um samstarvsavtalan við Danmark ikki verður gjørd ordiliga, kann tað henda, at tað verður ógreitt, hvørjar uppgávur verða gjørdar hvar.

Fyri at taka samanum, heldur undirritaði, at ætlanin er alt ov avmarkað – og fakliga verður hesin ætlaði heilsumyndugleikin alt ov veikur at røkja sínar skyldur. Tískil má arbeiðast víðari við málinum.

Innihaldsliga broytist einki av, at Landslæknaembætið skiftir navn til Fólkaheilsumyndugleikin. Støðan kann enntá gerast verri, um einasta fakliga broytingin eftir, at vit sjálvi taka ábyrgdina av hesum økjum, sum higartil hava verið røkt av danska Heilsustýrinum, verður at seta tveir løgfrøðingar aftrat í starv í Heilsumálaráðnum og ein til Landslæknaembætið.

Tað broytist heldur einki av, at Landslæknin, Fólkaheilsuráðið og Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu nú skulu húsast undir somu lon – uttan aðrar skipanarligar ella tilfeingisligar broytingar fyri hesar stovnar.

Ein fólkaheilsumyndugleiki er ein ógvuliga týdningarmikil stovnur í einum vælferðarsamfelag. Við tað, at hesin stovnur bæði skal hava eftirlit við fólkaheilsuni og eftirlit við starvsfólki í heilsuverkinum og bygnaðinum í heilsuverkinum, t.v.s. hvussu heilsuverkið virkar, so er talan um ógvuliga krevjandi uppgávur.

Harafturat verður tað ikki mett ráðiligt at fremja yvirtøkur av málsøkjum í løtuni í tí fíggjarstøðu, sum sitandi samgonga hevur ført okkum í.

Við hesum viðmerkingum mælir undirritaði tí til at fella uppskotið, og vísir samstundis á, at tað eigur at verða arbeitt víðari við yvirtøku av Landslæknaembætinum, við nøkrum málsøkjum, ið Landslæknin umsitur vegna Sundhedsstyrelsen, og við skipan av einum veruligum fakligum fólkaheilsumyndugleika í Føroyum.

Meirilutin tekur ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Høgni Hoydal) tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja tað.
Allar grundgevingar eru fyri, at vit sjálv taka ábyrgdina av og vinna okkum allar heimildir á heilsuøkinum.
Við hesum uppskoti kunnu vit í Føroyum byggja upp ein sterkan fakligan fólkaheilsumyndugleika, sum kann leggja til rættis, fremja avgerðir, gransking og samstarva við aðrar føroyskur myndugleikar og onnur lond um øll viðurskifti, ið hava týdning fyri fólkaheilsuna hjá Føroya fólki og fyri alt tað føroyska heilsuverkið.
Við hesum uppskoti kann alt tað føroyska heilsuverkið lyftast upp og raðfestast, soleiðis sum allir flokkar hava sagt seg vilja.
Við hesum uppskoti verður landslæknaembætið skipað undir føroyskum myndugleika og vit taka fulla lóggávu- og fyrisitingarheimild á hesum økjum:

- farsóttarlóggávuni,

- euforiserandi evnum,
- sjúkufyribyrging,
- eftirliti við heilsustarvsfólkum og stovnum á heilsuøkinum,
- sinnissjúkraviðurskiftum,
- líkskoðan,
- vevnaðarflutningi,
- sjúklingarættindum
- og eftirgjørdum gitnaði

Hetta uppskotið er upprunaliga gjørt í Heilsumálaráðnum, og Tjóðveldi legði tað fyrstu ferð fram í vár, áðrenn koronufarsóttin tók seg upp. Uppskotið varð eisini lagt fram, áðrenn orðaskiftið um nýggj átøk viðvíkjandi rúsevnum tók seg upp í vetur og orðaskiftið um eftirgjørdan gitnað.
Síðan er týdningurin av at fremja hesa yvirtøkuna vorðin alt meira eyðsýndur. Nú er møguleikin at gera nakað við tað, sum politikarar i øllum flokkum hava sagt hava hugsanir og ætlanir um: Farsóttarlóggávuna og átøk fyri forða smittu, rúsevnalóggávuna, eftirgjørdan gitnað og annað.

Vit hava longu tikið ábyrgdina í praksis
Koronufarsóttin hevur so staðiliga prógvað, at tað eru føroysk fakfólk, føroyskir førleikar, hugflog og samanhald, ið hava víst sítt virði. Okkara dugnaligu heilsufakfólk traðkaðu til beinanvegin. Og danska landslæknaembætið bað um hjálp beinanvegin farsóttin varð staðfest, og viðurkendi, at tey høvdu ikki starvsfólkarorku ella møguleika at røkja sínar uppgávur á smittufyribyrgingarøkinum. Heilsumálaráðið traðkaði til, og fekk m.a. Bjarna á Steig, Pál Weihe og Shahin Gaini at ráðgeva, upplýsa og fremja stig á økinum.
Okkara dugnaligu fakfólk og granskarar – ikki minst Debes Christiansen og tey á Heilsufrøðiligu starvsstovuni saman við Shahin Gaini – tóku stig til kanningar, og tað hevur verið avgerandi fyri, at vit hava megnað so væl at basa smittuni.
Okkara læknar, sjúkrarøktarfrøðingar, laborantar, teknikarar, røktar- og heilsustarvsfólk annars, hava megnað uppgávurnar til fulnar. Og ikki minst hevur samanhaldið millum fólk verið avgerandi.
Sostatt er enn einaferð ritað í stein, at tað, ið vit megna sjálv sum tjóð, og sjálv hava tikið ábyrgdina av sum fólk, er tað, sum ber og tryggjar okkara livikor, møguleikar og menning.

Allir partar síggja fyrimunir við uppskotinum
Undir viðgerðini av málinum hava allir hoyringarpartar verið sera jaligir mótvegis uppskotinum.

- At vit eru før fyri at átaka okkum ábyrgdina og skyldurnar, er ongin ivi sáddur um.
- At tað hevur eyðsýndar fyrimunir fyri at menna alt tað føroyska heilsuverkið og styrkja føroysku fólkaheilsuna, hava fleiri hoyringarpartar gjørt vart við.
- At tað gevur nógv betri heimildir og møguleikar hjá føroyskum myndugleikum at fyribyrgja smittu og at samskipa tilbúgving, eru alllir partar eisini samdir um.
- At vit eisini fáa betri heimildir og lóggávu viðvíkjandi psykiatriska økinum, rúsevnafyribyrging, eftirgjørdum gitnaði o.ø., er eisini komið fram í viðgerðini.
- At ymsar avtalur skulu gerast við danskar myndugleikar, og at til ber at gera tað, áðrenn yvirtøkudagin, eru eisini allir partar samdir um.

Lat okkum nú fremja hetta stigið
Sostatt tala allar grundgevingar fyri at samtykkja málið. Tað kann tykjast marghátligt, at vit yvirhøvur standa í tí støðu, har vit ikki sjálv kunnu taka avgerðir um, hvørji tiltøk verða sett í verk fyri smittufyribyrging, koppseting o.a. Og tað kann tykjast uppaftur meira marghátligt, at vit ikki

sjálv virða okkara egnu fakfólk og myndugleikar til at geva teimum møguleika sjálv at standa fyri okkara heilsuverki og at samstarva á jøvnum føti við onnur lond.

Minnilutin tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Uttanlandsnevndin, 11. desember 2020

Bill Justinussen formaður	Brandur Sandoy næstformaður	Frimodt Rasmussen
Jaspur Langgaard	Heðin Mortensen	
Høgni Hoydal	Beinir Johannesen	